Høgni Iversen

Emne: VS: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis //LV HOYRINGSSVAR 25. JULI 2025

AppServerName: skjalhald.landsnet.fo
FileUpdateStatus: 0

Fra: Jóannes N. Dalsgaard <JoannesNd@umhvorvi.fo>
Sendt: 31. juli 2025 08:31
Til: Pól E. Egholm <pole@umhvorvi.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>
Emne: Fw: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis //LV HOYRINGSSVAR 25. JULI 2025

Sent from Outlook for Android

From: Sigurð Ó. Vang <SiVa@lv.fo>
Sent: Friday, July 25, 2025 5:41:39 PM
To: Jóannes N. Dalsgaard <JoannesNd@umhvorvi.fo>
Cc: Hilmar Høgenni <HilmarH@umhvorvi.fo>; Marjun Weihe Thomassen <MaTh@lv.fo>; Marjun Eysturoy <MaEy@lv.fo>; LV - Journal <journal@lv.fo>; Steinar Eirikstoft <steinar@ls.fo>; Jóan Símun Saltá <joan.simun.salta@ls.fo>; Bjørgfríð Ludvig <Bjorgfrid@hmr.fo>; Selma Davidsen <selma.davidsen@hmr.fo>
Subject: SV: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis //LV HOYRINGSSVAR 25. JULI 2025

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ,
Cc: Heilsumálaráðið,
cc: Sjúkrahúsverkið,

Góðan dagin Jóannes,

Umhvørvismálaráðið,

Hoyringssvar til lógaruppskot til at geva Húsalánsgrunninum ræðisrætt til bygningin Eirargarður 2 í Tórshavn

Víst verður til hoyringsskriv 25. juli 2025.

LV hevur fylgjandi viðmerkingar: (LV hevur vegna skotbráðið, ikki fingið umrøtt skrivið yvirfyri Heilsumálaráðnum og Sjúkrahúsverkinum!).

Til § 1, stk. 1
Sum § 1 er lýst er hetta eitt beinleiðis frávik frá § 15 í Matrikullógini. Hetta skapar møguligan iva um tað við tí fer at bera til at lýsa veð í bygninginum? Tí avbjóðingin júst er, at tørvur er á sýndurbýti tí talan er um bygning fevndur av løgfrøðiliga ognarhugtakinum *bestemt fast ejendom*, ið inniber, at ikki ber til at frábýta longu bygdan bygning frá lendinum.

Møguleiki er kanska í staðin at nýta § 16, stk. 1, litra h í *Matrikullógini, tá tað eftir matrikulmyndugleikans meting, sum skal góðkennast av landsstýrismanninum, eru serligar umstøður, ið tala fyri sundurbýti.*

LV ivast somuleiðis um orðið *ræði* er rætta orðið í hesum førinum og um tað kemur at vera nóg greitt í mun til veð og tinglýsing?
Er ikki nærri talan um, at Eirargarður 2 verður latin Húsalánsgrunninum saman kringliggjandi øki, við teimum treytum sum lýstar í §§ 2,3,4 og 6.

Til § 1, stk. 2.
Í § 1, stk. 2 verður ásett, at Heilsumálaráðið varðveitir ræðið yvir niðastu hæddini. Spurningurin er um tað hevði verið greiðari at tikið hettar burtur og heldur gjørt brúks- ella leiguavtalu sbrt. § 4, stk. 2 ?

Til § 4, stk. 1.
LV ivist í um orðið *framleiga* er viðkomandi í hesi samansetingini? Tí tað orðið vanliga vildi verið brúkt í sambandi við leigaða ogn.

Annað

Deklaratión frá 6. september 2007
Annars skal viðmerkjast at byrða er lýst við deklaratión frá 6. september 2007 á matr.nr. 1000a, ið knýta seg at útsjónd og parkeringsviðurskiftum, um ognin skiftir eigara. Hetta ger seg møguliga galdandi í hesum føri.

Hitaskipan
Bygningurin fær hitaveiting frá hitamiðstøðini hjá LS á Eirargarði 7 og verður neyðugt at gera avtalu millum LS og Bústaðir um hesa veiting framyvir.

Ferðslu- og parkeringsviðurskifti í Eirargarði
Sbrt. avgerð hjá bygginevndini á LS verður í løtuni arbeitt við at fáa gjørt uppskot til at skipa ferðslu- og parkeringviðurskiftini av nýggjum og kemur tað so ella so at hava ávirkan á Eirargarð 2.

Heildarætlan fyri Eirargarð
Í 2011 var gjørd heildarætlan, góðkend av Tórshavnar kommunu, fyri matr. 1000a og 1000e og sum skuldi vera grundarlag fyri serstakari byggisamtykt fyri økið. Tann tilgongdin er ikki liðug.

Byggisamtyktarviðurskifti
Verandi byggisamtykt fyri økið er D3 almennir stovnar. Sum útgangsstøði verður neyðugt at broyta byggisamtyktina til at vera A2 øki, ið er høg bústaðarbygging. Økisásetingin A2 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini ásetur, at útstykking bert kann fara fram um ein serstøk byggisamtykt er fyri økið. Tí er spurningurin um ætlanin við lógaruppskotinum skal síggjast sum eitt slag av útstykking?

LV metir sum heild, at tað er skilagott at fingið gjørt serstaka byggisamtykt fyri Eirargarð og sjúkrahúsøkið annars og soleiðis fingið ein smidlari karm um framtíðar bygging í økinum.

LV hevur avtalað fund 21. august 2025 við Tórshavnar kommunu saman við Bústøðum at viðgera bygging av lestrarbústøðum sum heild í kampusøkinum og eisini hesa verkætlan í Eirargarði við atliti til byggisamtyktarviðurskiftini, ið neyðug eru at broyta fyri at fremja hesa verkætlan og aðrar.

Eru spurningar v.m. er LV til taks.

Bestu heilsur,

SIGURÐ Ó. VANG
Deildarleiðari | Head of Divison
Verkætlanardeildin | Division of Design and Construction
+298 290 871 // www.landsverk.fo

LANDSVERK

Øll málsviðgerð hjá Landsverki er fevnd av dátuverndarlógini.
Kunning um dátuvernd er at finna her.

Fra: Jóannes N. Dalsgaard <JoannesNd@umhvorvi.fo>
Sendt: 25. juli 2025 12:01
Til: Sigurð Ó. Vang <SiVa@lv.fo>
Cc: Hilmar Høgenni <HilmarH@umhvorvi.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
Prioritet: Høj

Góði Sigurð

Sambært avtalu við Hilmar sendi eg tær viðfest uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2.

Vinaliga
Jóannes N. Dalsgaard
fulltrúi

Telefon: +298 358700
Fartelef.: +298 734061
joannesnd@umhvorvi.fo

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Telefon: +298 358700
www.umhvorvi.fo
umhvorvi@umhvorvi.fo

Fra: Jóannes N. Dalsgaard
Sendt: hósdagur, 24. juli 2025 13:41
Til: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>; Atli Suni Leo <Atli@fmr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Bjørgfríð Ludvig <Bjorgfrid@hmr.fo>; Sigurð í Jákupsstovu <Sigurdj@us.fo>; 'us@us.fo' <us@us.fo>; 'MaleneJ@us.fo' <MaleneJ@us.fo>; bustadir@bustadir.fo; tesa@estunlar.fo; 'Jógvan Ósá' <Jogvan@bustadir.fo>
Cc: Margit Stórá <MargitS@umhvorvi.fo>; Pól E. Egholm <pole@umhvorvi.fo>; Hilmar Høgenni <HilmarH@umhvorvi.fo>

Emne: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
Prioritet: Høj

Góðan dag

Viðfest verður sent tykkum til ummælis uppskot til løgtingslóg umat geva Húsalánsgrunninum ræðisrætt til bygningin Eirargarður 2 í Tórshavn.

Løgtingslógaruppskotið skal gera tað møguligt hjá Húsalánsgrunninum at gera bygningin til lestrar- og ungdómsbústaðir at leiga út.

Ætlanin er at leggja uppskotið fram á Ólavsøku. Skotbráðið er tí ógvuliga stutt. Umhvørvismálaráðið heitir á tykkum um at senda okkum tykkara viðmerkingar **ikki seinni enn í morgin fríggjadagin 25.07.2025 kl. 12:00**.

Vinaliga sendi viðmerkingar tykkara til undirritaða joannesnd@umhvorvi.fo.

Hava tit spurningar kunnu til venda tykkum til Hilmar Høgenni deildarstjóra á tlf. 558090.

Vegna Umhvørvismálaráðið
Jóannes N. Dalsgaard
fulltrúi

Telefon: +298 358700
Fartelef.: +298 734061
joannesnd@umhvorvi.fo

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Telefon: +298 358700
www.umhvorvi.fo
umhvorvi@umhvorvi.fo